# Atgongd til rávøru uttan at darva kappingini um fiskin

**– Tað ræður um at byrja eina gongd, sum røkkur endamálinum at fáa mest møguligan fisk virkaðan í Føroyum, siga feløgini, sum hava latið landsstýrismanninum eitt tilmæli**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað er ikki lætt at finna breiðar semjur um øll viðurskifti millum feløgini á fiskivinnuøkinum, men nú er so enn ein roynd gjørd at fáa í lag semju í vinnuni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fríggjadagin, 10. desember, kallaði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, til tíðindafund í Fiskimálaráðnum. Høvið til fundin var, at Føroya Ráfiskaseljarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag saman við advokatinum, Alfredi Petersen, hava gjørt eitt tilmæli, sum feløgini kalla eitt »felags útspæl frá vinnuni«.

Feløgini, umboðandi veiði- og virkisliðið, vildu við hesum geva landsstýrismanninum eitt uppskot sum alternativ til »fiskapakkan«, ið landsstýrismaðurin seinastu tíðina hevur arbeitt við at fremja í verki.

– Fyritreytirnar fyri okkara uppskoti eru tær somu sum í uppskotinum hjá landsstýrismanninum, nevniliga at tryggja føroyskum virkjum javnbjóðis atgongd til rávøruna – uttan at darva kappingini um fiskin.

Feløgini siga í brævinum, at ein onnur fyritreyt er, at eingin patentloysn finst á økinum.

– Tí ræður um at byrja eina gongd, sum røkkur endamálinum at fáa mest møguligan fisk virkaðan í Føroyum. Vinnan vil fegin í tí dagliga vera við til at stuðla hesi gongd og at tillaga skipanina, so endamálið verður rokkið.

Føroya Ráfiskaseljarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag vísa á, at í sama mun, sum hetta tilmælið loysir trupulleikarnar hjá virkjunum við atgongd til fiskin, fer tað eisini at stuðla arbeiðarafeløgunum í teirra áhuga at fáa flest møgulig arbeiðspláss á landi.

# Tilmæli: At tryggja virkjunum javna tilgongd og skipunum besta prísin

**Ein partur av tilmælinum hjá vinnuni snýr seg um at gera nýggjar reglur um uppgerð av fiskidøgum, sum eggja skipum til at gera styttri túrar**

TILMÆLI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Fyri at tryggja virkjunum eina javna tilgongd av fiski, bestu góðsku og skipunum besta prís, verða upplýsingar um øll viðkomandi veiðitøl samskipað av góðkendari uppboðssølu, sum sendir tær til allar áhugaðar fiskakeyparar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tilmælið, sum Føroya Ráfiskaseljarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag hava latið landsstýrismanninum, er í 12 punktum. Aftrat hesum eru fimm punktir nevnd, sum feløgini halda, at myndugleikar og vinna miðvíst eiga at arbeiða við til tess at menna kappingarførið í høvuðsvinnuni.

Tilmælið er soljóðandi:

1) Mælt verður landsstýrismanninum til í kunngerð at áseta reglur, sum ikki loyva proformasølu av ráfiski.

2) Allur fiskur, sum verður útfluttur óvirkaður úr Føroyum, skal av loyvishavaranum (skipinum) bjóðast út um føroyska góðkenda uppboðssølu, og loyvt skal vera øllum – eisini útlendingum – á jøvnum føti við føroyskar fiskakeyparar at bjóða uppá og keypa fisk frá føroyskum fiskiførum.

3) Fyri fiskasløgini, tosk, hýsu, longu, brosmu, kongafisk, svartkalva og havtasku, verður umframt ásetingarnar undir stk. 1 og 2 ásett, at minst 50% av árligu nøgdini hjá hvørjum fiskifari sær av hesum fiskasløgum, verður støddarflokkað umborð ella í landi, bæði tá ið talan er um, at fiskurin fer til virkingar í Føroyum ella verður fluttur óvirkaður av landinum. Hetta verður í fyrsta umfari sett í verk sum ein royndartíð, galdandi frá 1. mars 2005 til 1. mars 2006. Partarnir útgreina støddarflokkingina í felag.

4) Í og eftir royndartíðina verður mett, um skipanin við støddarflokking fyri fiskasløgini, nevnd undir stk. 3, hevur rokkið sínum endamáli. Tá verður eisini mett, um skilagott er at gera eina skipan fyri onnur fiskasløg enn tey omanfyri nevndu. Trý umboð fyri ráfiskakeypararnar og trý umboð fyri ráfiskaseljararn ar saman við einum per